


*- Ein av okkara fyrimunum er, at framleiðslan er í nánd av viðskiftafólkunum, sigur Jón Magnus Olsen, stjóri*

# So fleksibult sum reint plastikk

**PLASTIKK Føroyingar hava altíð brúkt nógv av plastikki, sum áður varð innflutt í stórum nøgdum úr øðrum londum. Men so kom hugsanin: Man tað ikki bera til at framleiða hetta sama her í Føroyum? - Í dag kunnu vit bara staðfesta, at tað hevur borið til, nú bæði kundar á sjógvi og landi keypa fast frá okkum, sigur Jón Magnus Olsen, stjóri á virkinum í Vestmanna**




*Ikki bert føroyingar, vísa framleiðsluni hjá Vest Pack áhuga. Bæði í Noregi og í Íslandi verða vørurnar seldar. - Og tað hendir, uttan at vit hava sølufólk á staðnum, sigur Jón Magnus Olsen, stjóri*

Orð/mynd: Snorri Brend

**Vestmanna:** - Hvør uppskriftin er til góðu undirtøkuna? Tja, eg veit ikki.

- Tað er kanska tað, at vit hava verið varnir, og hava gjørt okkara besta til at selja so nógv sum gjørligt, sigur stjórin á Vest Pack.

Soleiðis hevur lagið verið, líka síðani at Vest Pack sum fyritøka sá dagsins ljós í 1994. Fyri trimum árum síðani varð fyritøkan umskipað nakað, m.a. við at nýggir eigarar komu við í fyritøkuna.

Hetta var í eini tíð, tá tað var farið at sansa at fíggjarliga úti í heimi. Og soleiðis bleiv eisini hjá fyritøkuni í Vestmanna.

- Tað gingu ikki nógvir dagar aftaná hetta, fyrrenn altjóða fíggjarkreppan var yvir okkum, sigur Jón Magnus, og leggur síðani aftrat:

- Hinvegin var tað kanska ikki verri at byrja av nýggjum í fíggjarliga ringum tíðum. Og satt at siga, hevur tað gingið rímiliga væl síðani.

Í dag starvast 20 fólk á Vest Pack. Og tey hava øll úr at gera hvønn einasta dag.

## Fleksibul

Skal ein lýsa virkisøkið hjá Vest Pack, kemur ein ikki uttan um, at tað er framleiðsla av plastikki og etikettum.

Seinnu árini hevur Vest Pack verið heildarveitari av pakkitilfari og tí sum fylgir í kjalarvørrinum av tí. Hetta sæst aftur í tí, at fyritøkan eisini kann veita vørur sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg og pakkimaskinur.

Hetta vísir eisini eitt annað eyðkenni hjá Vest Pack, nevniliga tað, at fyritøkan er fleksibul, tí ein hevur framleiðsluna í nánd av viðskiftafólkunum og ikki í øðrum landi hinumegin hav.

- Vit hava somuleiðis møguleika at tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, ikki minst tá talan er um nøgd, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu, enn okkara kappingarneytar uttanlands, verður sligið fast.

Hóast tað kann vera ringt hjá tí vanliga fólkinum at skilja, hvussu nógv tey á Vest Pack framleiða um árið, so kann sigast, at talan er um 600 tons av vørum.

- Henda nøgdin hevur verið rættiliga stabil hesi seinastu árini, staðfestir Jón Magnus Olsen. - Onkutíð minni og onkutíð meiri, men kortini hevur tað ligið um eini 600 tons um árið.

## Út um landoddarnir

Nógv tann størsti parturin av framleiðsluni hjá Vest Pack endar hjá føroyskum fyritøkum.

Men tað er eisini áhugavert at nevna, at vørur frá fyritøkuni eru at finna bæði í Noregi og Íslandi. Hvussu ber tað til, at tey sluppu inn á norska marknaðin?

Vest Pack keypti vørur úr báðum londunum, og gjørdist tað so líðandi til tað, at hesir keypararnir høvdu áhuga í at keypa lidnar vørur aftur frá føroysku fyritøkuni. Hesar vørurnar skuldu síðani seljast víðari til viðskiftafólk teirra í londunum báðum.

- Tað henta hjá okkum er, at teir taka sær sjálvir av øllum søluarbeiðinum. Tað vil so aftur siga, at vit hava eingi sølufólk í Noregi ella í Íslandi, men sleppa kortini av við framleiðslur okkara har, greiðir Jón Magnus frá.

Ein orsøk til hetta kann vera, at verksmiðjurnar har eru so mikið stórar, at tær ikki hava lagt seg eftir smærri ordrum, sum tey á Vest Pack hinvegin hava.